

Sue Philbrow, gumma her saman við Solmunde skipara.

# Sue Philbrow gumma til Thor Modi dóp í Istanbul

**Jan Müller**

14.05.2015 - 13:20

Oljan.fo

Tað var eingin minni enn sjálv drívmegin á altjóða skrivstovuni hjá Thor í Hósvík, Sue Philbrow, sum fekk heiðurin at geva nýggjasta stolta farinum í Thor-flotanum, Thor Modi, navn fyrrapartin. Og alt gekk uppá stás, tá skrivstovustjórin hjá føroyska frálandsreiðaríinum í besta sólskinsveðri kastaði champanjufløskuna móti skipinum, sum er tað næsta av fýra nýggjum seismikkveitingarskipum, ið Thor letur byggja á Besiktarskipasmiðjuni í Turkalandi. Røðuna til hátíðarhaldið helt ein av eigarunum og stjórunum, Per Gulklett. Triðja skipið er klárt í summar og tað seinasta seinni í ár. Øll fýra skipini eru langtíðarleigað til norska seimsikkfelagið PGS.






